## Danir fingu einki mál

Tað var eitt vónbrot fyri danir, at fótbóltslandsliðið spældi málleysan javnleik ímóti Norðurírlandi á heimavølli. Landsliðsvenjarin Morten Olsen var misnøgdur við avriki hjá sínum spælarum.

- Spælararnir runnu og stríddust alt tað, sum teir kundu. Vit spæla ein góðan fyrra hálvleik, men so hvørt sum tíðin gongur, og støðan framhaldandi er 0-0, missa vit friðin í spælinum. Spælararnir royna ov skjótt at gera ein avgerandi avlevering, og tey hevði við sær nógv sjusk, segði danski landsliðsvenjarin eftir dystin.

Morten Olsen var eisini misnøgdur við, at liðið ikki fekk meira burtur úr deyðbóltsstøðunum, sum liðið hevði vant nógv undan dystinum.

## Sviar søktu spaniólar

Svøríki vann leygardagin 2-0 á Spania í EM-undandysti. Londini eru í bólki saman við eitt nú Danmark, og svenski sigurin kom sera væl við, meðan Spania er í trupulleikum eftir tvey tap á rað. Málskjúttar hjá Svøríki leygardagin vóru Johan Elmander, sum fyri kortum spældi við Brøndby, og Markus Allback, sum spælir fyri FCK.

Ísland spældi eisini dyst í hesum bólki, og her gekk av skriðuni til hjá Íslandi, sum tapti heili 4-0 á útivølli ímóti Letlandi.



# Tað krevur sín stuðul

**Tað er eitt sjálvsagt krav, at vit stuðla fótbóltslandsliðnum. Tí spælararnir umboða jú okkum øll, heldur Martin á Mýrini, sum er ein av føroysku áskoðarunum á Fraklands-ferðini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Basel, Sveis:** Ferðalagið, sum ferðast við landsliðnum, hevur onkra tíð verið størri, enn tað er í Fraklandi hesaferð. Umframt FSF-ferðalagið og tilhoyrandi tíðindapartin vóru eini 15-20 áskoðarar við flogfarinum hjá Atlantic, og tað er ikki víst, at hesi fara at hoyrast so væl millum tey mongu túsund við leikvøllin.



*Martin á Mýrini er fastur fúsur í landsliðsferðalagnum. Síðani 1999 er tað bert tann eina útidystin, sum hann ikki hevur sæð live*

### Ein lívsstílur

Hinvegin má sigast, at talan er um trúgvar stuðlar, sum nú eru við, og tað kann kanska viga nakað upp ímóti vantandi talinum.

Ein av teimum, sum fleiri ferðir hevur verið partur av ferðini, er Martin á Mýrini. Sum spælari í HB og eisini onkra ferðina á landsliðnum er hann á ongan hátt eitt navn, sum er ókunnugt fyri fótbóltshugaða føroyingin.

Og hóast hann rættiliga tíðliga noyddist at stilla gaggurnar, so hevur hann tó sum dómari – og í dag sum eygleiðari – eisini sett sín dám á spælið við leðurkúluni.

Og hann er eisini skjótur at ásanna, at bólturin onkursvegna hevur bitið seg fastan í tilveru hansara.

- Tað er kanska eitt slag av lívsstíli. Bólturin hevur altíð verið ein týðandi partur av míni tilveru, og tí er tað eisini nakað, sum eg raðfesti høgt. Ítróttur sum heild hevur eisini givið mær rættiliga nógv, haldi eg. Bæði sum kropslig røkt, og ikki minst sum upplivingar.

### Ivaðist ongantíð

Fyrstu árini var tað tó mest á skíggjanum, at Martin fylgdi við, tá landsliðið royndi seg á altjóða pallinum, men eftir eina ferð til Prag í '99, broyttist hetta.

- Tað var ein fantastiskur túrur har niður, og síðani havi eg verið fastur fúsur. Av útidystunum eftir hetta er tað bara tann í Reykjavík fyri trimum árum síðani, sum eg ikki havi verið til.

Nú vóru fyrstu úrslitini í hesi undankappingini einki serlig. Fleiri hava eisini tosað um fallandi áhuga fyri liðnum, men tú er so kortini við. Ivaðist tú ongantíð, tá atgongumerkið skuldi bíleggjast?

- Ikki eina løtu. Tá landsliðið spælir, so er tað eitt umboð fyri okkum øll. Og tað krevur, at vit geva liðnum okkara stuðul. Ikki minst, tá tað gongur ímóti.

- Og hartil eru hesar ferðirnar eisini í ávísan mun meira enn bara ein fótbóltsferð. Vit eru ein hampuliga fastur bólkur, sum plagar at ferðast við, og tí hoyrir mann á ein hátt til her. Upplivingarnar eru jú eisini nógvar, og tað er eitt slag av eykavinningini við ferðunum, um eg kann siga tað so.

Og eg kann ætla, at hetta verður ikki seinasta ferðin?

- Tað er so ikki ætlanin. Eg ætlai mær í øllum førum at vera við, so leingi sum heilsan og pengapungurin loyvir tí, sigur Martin við einum avgjørdum smíli.

## Skaðar avgjørdu úttøkuna

Tað gav seg at kalla sjálvt, tá Jógvan Martin Olsen sunnudagin skuldi gera av, hvørji teir 18 skuldu verða, sum vóru við í landsliðshópinum á ferðini til Frakland. Upprunaliga hevði landsliðsvenjarin tikið út 22 mans til dystirnar móti Litava og Fraklandi, men við skaðanum hjá Óla Johannesen var hetta talið komið niður á 21. Og tað gjørdust so eisini tríggir skaðar, sum settu teir seinastu tríggjar spælararnar eftir.

Julian S. Johnsson gav avboð beint undan dystinum móti Litava, og tað eydnaðist ikki at fáa hann kláran undan fráferðini. Og hartil hava bæði Hanus Thorleifsson og Hans Pauli Samuelsen drigist við skaða. Hvørgin teirra var í hópinum, tá dysturin leygardagin varð spældur, og hvørgin teirra varð mettur at vera nóg birgur undan fráferðini til Fraklands.

**-mørk**

## Hvíld er neyðug

**Hvíldin verður tikin fram um venjing í fyrireikingunum hjá landsliðnum til dystin ímóti Fraklandi**

FRAKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru ikki tær heilt nógvu venjingarnar, sum standa á skránni á landsliðsferðini hesaferð.

Hóast liðið hevur fýra dagar til fyrireikingarnar í Fraklandi, so er tað fyrst og fremst hvíld, sum eyðkennir skránna hjá liðnum. Kanska ikki løgið, tá hugsað verður um, at dystur eisini varð spældur leygardagin, og at spælararnir hava brúk fyri at løða battaríini aftur til dystin mikukvøldið.

Fyrrapartin í dag var fyrsta venjingin á skránni, og síðani gongur tað mesta av degnum við hvíld og einum fundi, har hugt verður at sjónbandi við fronskum landsliðsfótbólti.

Týsdagin sleppa spælararnir at taka sær av løttum fyrrapartin, ein shopping-túrur eisini er á skránni, og um fimmtíðina verður so vant á Stade Auguste Bonal í Sochaux, har dysturin verður spældur.

Dysturin ímóti varaheimsmeistarunum úr Frakland verður so mikukvøldið klokkan 20 føroyska tíð, og fyrst og fremst er tað eisini dysturin, sum merkir tann dagin. Taktikkurin skal stingast út í kortið, og síðani verður talan um hvíld, mat og drekka, soleiðis at hópurin er best møguligt fyri, tá farið verður í eldin.

Landsliðshópurin og ferðalagið í Fraklandi annars fer heim aftur hósdagin.